## Gongugøtan liðug

Í rættiliga langa tíð hevur verið arbeitt við at leggja nýggja steinar og flísar í niðasta part av Niels Finsensgøtu – tað, sum vanliga verður nevnt gongugøtan. Øll tann gamla áleggingin hevur verið uppi og er nú løgd av nýggjum. Nú er arbeiðið liðugt, og ferðslan kann aftur at ganga ótarnað oman og niðan. Umframt at hava lagt koyri- og gongubreyt av nýggjum, eru eisini jarnboylar settir upp millum koyribreyt og gongubreyt vestaru megin. Hesir eru fyri at forða fyri parkering hesumegin. Loyvt er bert at parkera eystaru megin. Tað stendur at lesa á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.



## Eldur í sethúsum í Havn

Leygarkvøldið klokkan kvart í tíggju fekk løgreglan fráboðan um, at nógvur roykur kom úr einum húsum á Grønlandsvegnum í Havn. Eldur var kyknaður í køkinum, men sløkkiliðið megnaði at sløkkja, áðrenn eldurin breiddi seg. Ein maður var inni í húsinum, men hann slapp út, áðrenn ov seint var. Eldurin kyknaði á komfýrinum, har okkurt til matna var sett út á, men sum maðurin í húsinum var sovnaður frá. Vakthavandi í Havn sigur, at húsini hava fingið nakað av royk- og vatnskaða.



*Spenningurin á keiini á Skála var stórur, tá skrokkurin kom froysandi úr byggihøllini*

*Mynd: Bergur Østerø*

# Stórur dagur á Skála

**Í góðveðrinum fyrrapartin leygardagin vóru nógv fólk komin á skipasmiðjuna á Skála at fylgja sjósetingini av nýggjasta skipinum hjá Thor í Hósvík. Hetta er fyrstu ferð í 20 ár, at ein nýbygningur er gjørdur á Skála**

SKIPABYGGING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Í reiðarínum Thor hevur ikki verið nógv at gleða seg um seinastu tíðina. Tveir stórir eldsbrunar á risatrolarunum, Hercules og Athenu í Kyrrahavinum, hava sett síni spor í framsøkna felagið í Hósvík.

Leygardagin var øðrvísi, tá skip nummar 23 hjá felagnum og nýbygningur nummar 56 á Skála Skipasmiðju fór av bakkastokki.

Sjósetingin fór fram í dýrdaveðri, og tað sást á teimum mongu andlitunum á bryggjuni, sum vóru møtt fram í stórum tali, at hetta eisini var ein stórhending fyri bygdina. Hetta er fyrsta skipið síðani Heygadrangur fyri 20 árum síðani fór av bakkastokki, at eitt skip er sjósett á Skála.

Talan er um eitt 55 metrar langt veitingarskip, ið fer at arbeiða world wide í frálandavinnu og fer millum annað at sigla útgerð til seismikkskip, ið sjáldan koma til bryggju.

Arbeiðið byrjaði í november í fjør, og hálvan oktober verður tað latið eigaranum í Hósvík. Áðrenn hetta skal tað Hirtshals, har tað verður sandblást og málað.

Eftir sáttmálanum millum Thor og Tórshavnar Skipasmiðju skal verða heilt liðugt hálvan november.



*Lagið á Thor-brøðrunum, Hans Andrias Joensen, forstjóra og Gunnbjørn Joensen, stjóra, var betri enn tað hevur verið leingi, tá nýggja veitingarskipið hjá teimum varð sjósett. Her avmyndaðir saman við dóttir Hans Andrias, Guðrun*

# Ómøguligt uttan útlen



**Bæði stjórin á Tórshavnar Skipasmiðju og formaðurin í Havnar Handverkarafelag eru sannførdir um, at tað var rætt at loyva pólendingum til Føroya at smíða skrokkin á nýggja veitingarskipinum hjá Thor. Annars var uppgávan ikki gjørd her í landinum, siga teir báðir**

SKIPABYGGING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Hóast talan eru um tveir partar á hvør sínari síðu á arbeiðsmarknaðinum eru bæði Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðu, ið eigur skipasmiðjuna á Skála, og formaðurin fyri Havnar Handverkarafelag, Eli Brimsvík, samdir um eitt. Byggingin av veitingarskipinum Thor Alpha, ið fór av bakkastokki í gjár, var ongantíð komin upp á tal, um ikki myndugleikarnir og handverkarafeløgini høvdu givið grønt ljós fyri, at pólskir sveisarar skuldu fáa innferðar- og arbeiðsloyvi í Føroyum at smíða skrokkin. Partvís tí at føroyska ekspertisan á økinum er næstan horvin, men nógv meiri tí at lønarlagið í Føroyum ger, at skipasmiðjan ikki hevði verið kappingarfør við skipasmiðjur aðrastaðni.

– Vit høvdu ongan møguleika at bjóða upp á hesa uppgávuna ella á nakran hátt gjørt okkum galdandi, um vit ikki fingu avtaluna um pøllendingarnar, sigur Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju.

Formaðurin í Havnar Handverkarafelag tekur undir við, at hvørki hesin skrokkurin ella nakar annar skrokkur varð bygdur í Føroyum í framtíðini, um sýtt varð fyri at loyva útlendingum hendanvegin.

- Hetta sóu vit beinanvegin, tá vit vórðu spurdir, og tí ivaðust vit ikki á, at rætt var at gera avtalu við Thor og Skipasmiðjuna um hesa byggiuppgávuna, sigur